planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo




# Vetrarjazz í miðbýnum

Havnar Jazzfelag og jazztónleikarnar í Havn hava tikið stig til at stíla fyri einum Jazz Festivali, her á miðjum vetri.

Ætlanin er sambært fyriskiparunum, at festivalurin skal halda áfram og sum frá líður mennast til ein altjóða festival. Tó er ætlanin at halda tiltakið á einum inniligum støði, sum skal húsast í væl egnaðum og góðum hølum, ið eru í miðbýnum.

Kjarnin í einari slíkari stevnu eigur framhaldandi at vera tað lokala tónleikaumhvørvið, siga stig-takarar til Jazz Festivalin

Nógv hendir á sumri, og eisini í tíðini fyri jól. Í januar og februar er ikki eins nógv á skránni á tónleikaøkinum, og gleðiligt er tá, at eitt vikuskifti kann gerast ein tónleikaglotti í hesum myrku tíðum, siga fyrireikararnar.



# Tórshavnar Kommuna vil uppbyggja eina jazz mentan

Í samband við 100 ára haldið hjá Tórshavnar Kommunu, hevur kommuna valt at stuðla Jazz festivalinum, og Bogi Andreasen sigur, at Kommunan sjálvsagt skal verða við til at menna jazzmentanina í Havnini framyvir.

Ætlanin við festivalinum er at byggja uppá jazz mentanina í Tórshavn, og hetta er bert fyrsta stig á leiðini. Ætlanin er, at hesin vetrar festivalur skal mennast til ein altjóða festival.

-Vit mangla veruliga tiltøk á jazz økinum, og tá vit hava tónleikarar á so høgum støði sum Kristian Blak og aðrir sum veruliga brenna fyri sakini, vænti eg at undirtøkan verður góð, og at hetta kann gerast til eitt afturvendandi tiltak, sigur Bogi Andreasen.

Hvonn hevur havt ein leiklut í at menna jazztónleikin í Tórshavn og hevur hvørt týskvøld verið karmur um jazztónleik, har nógvir dugnaligir og viðurkendir tónleikarar hava framført.

- Eg havi verið til nógv jazz kvøld í Hvonn, og eftir mínum tykki hevur tónleikurin verið framúr góður, sigur Bogi Andreasen.

Nú verður so lunnar lagdar undir eina nýggja jazz mentan í Føroyum, og festivalurin ferð av bakkastokki komandi fríggjakvøld kl. 22.00.

www.tutl.com




tutl
á Káta Horninum

Jazz-útgávur síðan 1977